gult14 cyan14 magenta14 svart14



# Chet Atkins - slóðbrótandi guitarúrmælingur deyður



*Leygardagin í farnu viku doyði amerikanska guitar-virtousorin Chet Atkins. Hann var 77 ár*

**Chet Atkins kollvelti allan guitarheimin, tá hann brast inn á amerikanska country-tónleika-pallin síðst í 40'unum**

TÓNLEIKUR
*Niclas Johannesen*



Leygardagin í farnu viku doyði amerikanska guitar-virtousorin Chet Atkins. Hann var 77 ár.

Atkins, sum hevði stríðst móti krabbameini í fleiri ár, doyði heima hjá sær í Nashville. Fáur hevur sum Chet Atkins verið við til í farnu øld at nýskapa country tónleikin. 13 Grammy tala fyri seg og ongin ivi valdar um, at Chet Atkins var ein av høvuðsleikarunum at broyta country-soundið soleiðis, at tann stóra fjøldin tók tað til sín. Atkins var rætt og slætt við til at skapa 'Nashville soundið'.

Tað var serliga sermerkti fingrateknikkurin, ið eyðkendi guitarspælið hjá Atkins. Hesin stílurin flutti ikki bara mørk innan country-sjangruna, men er síðani eisini er blivin brúktur í jazz- og rockhøpi.

Sum ein av fremstu session-tónleikarunum, so hoyrist guitarspælið hjá Atkins á klassikarum, so sum Heartbreak Hotel við Elvis Presley, You Cheatin' Heart við Hank Williams og Wake Up Little Susie við The Everly Brothers. Umframt at spæla á útgávum hjá øðrum, so gav Chet Atkins eisini út rúgvu av egnum tilfari fyri plátufelagið RCA. Hann var eisini knýttur at hesum plátufelagnum í mong á sum produsari. Ein uppteljing fyri nøkrum árum síðani vísti, at Atkins hevði givið út fleiri enn 70 guitarplátur og hevði selt fleiri enn 74 milliónir plátur.

Hann var heiðraður mangar ferðir - og níggju ferðirnar útnevndi 'Country Music Association's Musician' Atkins sum 'ársins tónleikara'. Tey flestu kallaðu rætt og slætt Atkins 'Mr. Guitar' og á tí kenda Nashville Music Row finst eisini 'Chet Atkins Plase'.

## Byrjaði við fiól

Hansara leið móti viðurkenning var merkisverd og er á mangar hættir ein fagnaður av einum smædnum astma raktum dreingi, sum vaks upp í fátækradømi í Lutrell í Tennessee.

Hann byrjaði at spæla fiól, sum ungur drongur og nýtti hetta sum eitt slag av flýggjan frá beiska veruleikanum. Tónleikur var eisini í blóðinum - abbin spældi fiól, og móðurin var klaverspælari. Hon sang eisini. Pápin var ein ferðandi klaverlærari, sum viðhvørt eisini sang saman við ferðandi evangelistum.

Hóast tokkan til fiólina, so lokkaði guitarin eisini og níggju ára gamal byrjaði hann at klimpra á guitarin og longu sum tannáringur varð hann mettur at vera ein guitarleikari í toppklassa.

Aftan á at hann gjørdist liðugur í 'high school' í 1941, byrjaði hann at spæla regluliga á ymsum útvarpsshowum. Hann spældi við kendum nøvnum um tað mundið og síðst í 40'unum hevði hann gjørt sáttmála við plátufelagið RCA. Skjótt gjørdist hann fastur fúsur guitarleikari á óteljandi upptøkunum, sum vóru gjørdar frá 1950 og úteftir fyri RCA.

Hansara fyrsta hit-lag við RCA var ein endurinnspæling av kenda lagnum Mr. Sandman. Í 1957 gjørdist Atkins leiðari av deildini hjá RCA í Nashville.

Tey tjúgu árini, hann stóð á odda fyri tónlistarligu kósini hjá deildini RCA í Nashville vóru serstakliga gróðrarík, og tú kanst ikki nevna nøvn so sum Roy Orbison, Jim Reeves, Charley Pride, Dolly Parton, Jerry Reed, Walons Jennings og Eddie Arnold uttan eisini at nevna Atkins, sum var maðurin, ið knýtti tey til RCA.

Hóast stóra umsitingarliga arbeiðsbyrðu, so helt Atkins fram øll árini við sjálvur at framføra. Hann spældi fyri Kennedy, forseta, í Hvítu Húsunum og hann fekk sítt fyrsta topp-5 hit-lag við guitarsanginum Aakety Axe.

"Eg var rættiliga stinnur tá á døgum - í 50'unum og 60'unum", viðgekk Atkins í Music City News fyri nøkrum árum síðani. "Eg var djarvur og óvitandi og eg spældi rímuliga væl. Eg var í veruleikanum fremman fyri fleiri tá á døgunum. Nú royni at eg sum frægast at hanga í, men tá á døgum var tað hugaligt. Eg var á ein hátt ein uppfinnari, og tað var ikki stórvegis trupulleikar hjá mær at levera."

Í 1982 fór Atkins frá RCA og gjørdi sáttmála við plátufelagið Columbia, sum gav honum rúmari ræsur tónlistarliga. Hetta gav honum høvi at ferðast innan jazzin eisini, har hann eisini hevur vunnið fleiri prísir.

Seinastu árini var tað serliga í samstarvi við artistar so sum Steve Wariner, Suzy Bobuss, Mark Knopler, Neil Diamond og Dolly Parton, at Atkins kundi hoyrast. Men hansara mongu lurtarar ynsktu at hoyra solo-útgávur við Atkins, har guitarin var miðdepilin, og fyri fimm árum síðani gáv Atkins út sína síðstu guitarsolofløgu - Almost Alone.

"Tað var torført at gera," segði hann heldur skálkasligur. "Tí, tað gerst einsligt at spæla sologuitar og samstundis royna at gera eitt lag áhugavert í tveir ella tríggjar minuttir."

*Kelda: The Washington Post*




*Chet Atkins byrjaði at spæla fiól sum ungur drongur og nýtti hetta sum eitt slag av flýggjan frá beiska veruleikanum. Tónleikur var eisini í blóðinum - abbin spældi fiól, og móðurin var klaverspælari. Hon sang eisini. Pápin var ein ferðandi klaverlærari, sum viðhvørt eisini sang saman við ferðandi evangelistum*

gult15 cyan15 magenta15 svart15

ítróttur
Nr. 125 • mikudagur • 4. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Tveir nýggir vinnarar:
**Kvívíkingur og Sílið vunnu**
**síðurnar 17-21**



# Fasti starturin dumpaði í Fuglafirði



*Umframt trupulleikarnar av at flyta startin, so kiksaði eisini eitt sindur, tá 6-mannaførini við kvinnum róðu. Her síggjast tær á Snopprikki veipa við ørmunum, tí tær ikki sluppu leysar av startinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Róðrarsambandið eigur tveir fastat startir, men í Fuglafirði brúktu fyrireikararnir bara annan startin**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Eftir at tað á norðoyastevnu og á jóansøku hevði gingið sum eftir ánni við kapp-róðrinum, gekk tað syndarliga illa at fáa kappróðurin á varmakeldustevnu frá hondini.

Eitt korter til fýra hoyrdist startskotið fyri 5–mannaførunum við dreingjum, og klokkan var næstan sjey, tá 10–mannaførini komu skúmandi inn móti málinum.

At tað skuldi ganga so syndarliga illa er stórt spell fyri allar partar. Umframt kappróðurin var hjá teimum ítrótarhugaðu mest áhugaverda á stevnuskránni leygardagin fótbóltsdysturin í 2. deild millum ÍF og HB. Hann var settur at byrja klokkan seks. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað var hálvleikur í fótbóltinum, tá 10–mannaførini komu á mál, og tað sigur seg sjálvt, at áskoðaratalið var sera nógv minkað. At standa í fýra tímar í føroyska summarveðrinum og bíða kennist leingi.

## Starturin sveik

Orsøkin til, at tað gekk so syndarliga illa at fáa teir seks róðrarnar frá hondini, var fasti starturin. Lotið var ímóti, og hjá startdómaranum gekk tað illa at fáa bátarnar at liggja stavn um stavn.

Tað er Róðrarsambandið, sum eigur fasta startin, men tað eru lokalu fyrireikararnir, sum hava ábyrgdina av at leggja startin út. Sjálvum róðrinum taka startdómarin og høvuðsdómarin sær av. Teir koma báðir frá Róðrarsambandinum.

– Lokalu fyrireikararnir høvdu roynt fasta startin fyrrapartin leygardagin. Tað gekk av tí besta bæði á túsund metra málinum, og tá teir fluttu hann út á fimtan hundrað metra málið og út á tvey túsund metrar. Men seinnapartin bar ikki til, staðfestir Hanns Joensen.

Formaðurin í RSF sigur, at sum hann hevur skilt tað, so var stóri trupulleikin, at tað var torført at fáa bátarnar, sum lógu við endunum á trossunum, at liggja.

Fasti starturin varð brúktur til teir tríggjar róðrarnar á eitt túsund metrum. Tá starturin varð fluttur út á fimtan hundrað metrar rondu teir í meiri enn hálvan annan tíma at fáa hann at rigga, men so sleptu teir honum, og róðrarnir á fimtan hundrað metrum og tvey túsund metrum vóru avgreiddir við leysum starti.

Í orðaskitinum aftan á róðurin hevur verið frammi, at tað hevði verið nógv lagaligari, um tað vóru tveir fastir startir. Um annar hevði ligið á fimtan hundrað metra málinum, so hevði tíðin verið góð at flutt startin frá eitt túsund metra málinum og ut á tvey túsund metra málið.

Sambært formannin í RSF, so er tað einki, sum forðar fyri, at hetta verður gjørt:

– Vit eiga tveir fastar startir. Undan norðoyarstevnuni senda vit teir til Klaksvíkar, og so er tað ábyrgdin hjá lokalu fyrireikarunum at senda tilfarið víðari til teir næstu, sum skulu hava ábyrgdina. Hugsanin er, at tað skal bera til at leggja báðar út, tí tað eigur at vera skjótari bara at spenna startin upp í staðin fyri at flyta allan startin. Fyrrapartin leygardagin mettu lokalu fyrireikararnir í Fuglafirði, at tað fór at vera nóg mikið við øðrum startinum. Nú aftaná kunnu vit staðfesta, at tað ivaleyst hevði verið betri, um báðir høvdu verið nýttir, er viðmerkingin hjá formanninum í RSF, sum ivaleyst fer at tosa við lokalu fyrireikararnar í Hvalvík, áðrenn teir taka avgerð um, hvussu tað skal verða við fasta startinum komandi leygardag.

